NØVN Í VIKUNI

Sofus, sálarlækni, seksti

Hósdagin 20. des. fyllir Sofus Joensen, leiðandi yvirlækni á sálarsjúkudeild Landssjúkrahúsins seksti ár.

Hann var eitt skifti í sjeytiárunum hjálparlækni á psykiatrisku deild, fór síðani niður aftur at útbúgva seg til serlækna í sálarsjúkum og virkaði sum slíkur niðri eina tíð, til hann fyri umleið 10 árum síðani kom heimaftur at taka við sum skipari á tí føroysku psykiatriskútuni eftir Árna Olsen, Hera Berg og August Gabriel Wang.

Og her hevur hann so sær líkt, spakur og sáttligur, men við hegni, fastleika og tó við mildni fært deildina væl ígjøgnum trupul rakstrarár, tá tað í niðurgangstíðum sansaði at og breyt um bæði borð.

Slíkt krevur sín mann og slítur sjálvandi, men hevur Sofus staðið stinnur.

Og í so máta hevur Sofus gott í at bræða. Annar abbin var hin tiltikni sjógarpurin Sofus í Jógvanstovu á Geilagarði í Leirvík og hin abbin sterki Jákup á Geilini í Gerðum í Klaksvík. Eisini ommurnar báðar vóru av raskastu fólkum.

Sjálvur er Sofus barnvaksin í fjølmentum fiskimannaheimi í Leirvík og man har í uppvøkstri sínum hava fingið gott í beini bæði so og so.

Sum bygdarfólk og leirvíkingur skal nógv akademisk árin til at vaska tann góða førningin av honum.

Honum dámar sostatt framvegis sera væl at flota, tó at fáar stundir eru til tess, men er hann so avbera grammur, hegnigur og áhaldin at krøkja fisk, at var tað ikki fyri eyguni, var hann heilt vist vorðin sum so mangir aðrir í báðum ættum, fiskimaður og skipari av professión, men hann er so ístaðin vorðin skipari á tí føroysku psykiatriskútuni, sum ikki vist er tað slakari.

Sofus er vinsamt og hugnaligt fólk, lesur nógv, dugir at seta uppá rím eins og at sita undir orðinum, og vilj vit, manningin á pyskiatrisku deild, við hesum heilsa honum á hansara seksti ára degi og ynskja hoinum alt gott framyvir.

Manningin

Eitt ómissandi skjal frá ungari gentu

Bókadeild Føroya Lærarafelag hevur givið út bókina Anna Frank - Dagbókin, sum er millum mest lisnu bøkur í Vesturheiminum eftir seinna heimsbardaga

ÚTGÁVA

Anna Frank - Dagbókin er ein innilig lýsing og eitt tungt farvæl. Eitt ómissandi skjal um eitt tíðarskeið, vit aldrin mugu gloyma.

Anna skrivar í fyrstuni um seg sjálva sum eina væl umtókta gentu, um góðar vinkonur og troyttandi dreingir. Hon fortelur um flokkin, hon gongur í, dreingirnar og genturnar, vinkonurnar og systrina, Margot. Um tryggu tilveruna, hóast allar tær strongu lógirnar, ið vórðu settar í gildi fyri jødar - líka til Margot 8. juli 1942 fær boð um at møta hjá SS. Yvir háls og herðar rýma tey og fjala seg í Bakhúsinum, har pápin arbeiðir.

Anna Frank er 13 ár, tá ið vit hitta hana, og hon er 15, tá ið hon sigur farvæl. Hetta tíðarskeiðið fylgja vit einari gentu, ið búnast og gerst sjálvstøðugt. Hon sigur frá sínum loyniligastu hugsanum, og vit lesa um, hvussu illa hon situr um sátt við mammuna, um gerandisdagin í Bakhúsinum, um hennara dreymar og kynsligu menning. Seinasta hálva árið eru hon og Petur væl, og bæði fáa tey roynt kærleikan.

Anna var gentan hjá pápa sínum. Tað varnast tú skjótt, meðan tú lesur. Hon heldur, at mamman ger mismun og heldur meira um stórusystrina, Margot. Ongin hugsaði um Annu, hennara longsul, hennara sakn. Bara dagbókin skilti hana, og hjá Peturi fann hon hita og troyst.

Um várið 1944 droymdi Anna Frank um, at hon skuldi geva út eina bók, tá ið kríggið var av. Hon ætlaði, at dagbókin, sum hon skrivaði frá 12. juni 1942 til 1. august 1944, skuldi vera støðið undir bókini. Men 4. august 1944 kom ein SS-heryvirmaður og tríggir hálendskir hjálparmenn frá "Grüne Polizei" og handtóku hana og hinar jødarnar, sum fjaldu seg saman í Bakhúsinum í Amsterdam. Onkur hevði svikið tey. Sama dag bjargaðu hjálparfólk teirra øllum, ið Anna hevði skrivað.

Anna Frank doyði í týningarleguni Bergen-Belsen í februar/mars 1945. Eitt tað seinasta, hon skrivaði í dagbókina, var: "Eg vil liva, eftir at eg eri deyð." Hetta ynski hennara varð uppfylt.

Sum áður nevnt skrivaði hon dagbók frá 12. juni 1942 til 1. august 1944. Fyrstu tíðina skrivaði hon bara til sín sjálvs, men um várið 1944 gjørdi hon av, at hon skuldi geva eina bók út eftir kríggið. Tí fór hon undir at skriva dagbókina av og laga hana til. Samstundis skrivaði hon eisini í upprunaligu dagbókina. Tá ið pápi Onnu, Otto Frank, eftir kríggið fekk alt tilfarið, valdi hann at ganga ynskinum hjá dóttrini á møti og lata dagbókina koma út sum bók. Hann nýtti báðar dagbøkurnar, ta upprunaligu og tað tillagaðu, í hesi fyrstu útgávuni. Nógv varð lagt burturúr, m.a. tí Anna skrivaði frítt um tað kynsliga - og so vildi hann ikki, at nakar skuldi hugsa ilt um konuna og hini, ið krógvaðu seg saman við teimum.



Í 1982 kom út nýggj útgáva, ið Mirjam Pressler ritstjórnaði. Bókin var nú er fjóðring størri enn tann fyrsta, og henda útgávan gevur eina sanna mynd av einari vitugari, kenslusamari ungari gentu, ið er fyri teirri ræðuligu vanlagnu, at verða innistongd og krógvað burtur, 13 ára gomul. Seinast í 1990 árunum komu fimm higartil ókendar blaðsíður undan kavi. Nøkur brot úr teimum eru lagdar afturat í hesari útgávuni.

Anna Frank - dagbókin er 318 bls., heft við klaffum. Frida Sofía Johannessen týddi úr hálendskum. Bókin er umbrotin, prentað og heft á Pf. Einars Prent. Hon kostar kr. 150 í bókabúðunum.

Eyðun og Terji á Platform

DANSUR
Tíðndaskriv

Komandi vikuskiftið fara teir báðir, Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen, at hava tvær framførslur. Leygarkvøldið verður konsert í ítróttarhøllini á Kambsdali.

Fríggjakvøldið fara Eyðun og Terji at spæla í Havn. Teir fara at spæla allar sínar kendu sangir á Platform. Hetta gjørdu teir eisini fyrr í ár, og tá riggaði tað avbera væl.

Eyðun og Terji fara at spæla fleiri ferðir gjøgnum kvøldið, og tá teir ikki eru á pallinum, verður diskotek.

Dýrt at fara til Grand Prix

GRAND PRIX
Eirikur Lindenskov

Tað verður dýrt hjá teimum fáu estlendingunum, sum fáa møguleikan at tryggja sær eitt atgongumerki til Meldodi Grand Prix, sum verður í Tallinn komandi ár. Tað er estlendska sjónvarpið, sum skipar fyri, og tey hava bara sett 1.500 atgongumerki av til leysasølu í Estlandi – og sølan fer fram á uppboðssølu um internetið til ein minsta prís upp á 4.500 estiskar krónur, tað er tað sama sum 2.140 krónur í okkara pengum. Hetta svarar nøkulunda til eina mánaðarløn í baltisku londunum.

Tað var estiska poppduoin, Padar & Bentons, sum vann Melodi Grand Prix í ár í Keypmannahavn, og tí er Estland vertsland hesaferð.

Melodi Grand Prix verður í Saku-Høllini í Tallin tann 25. mai komandi ár, og inn sleppa 6.400 áskoðarar.

Men fyrireikararnir hava fingið nógvan kritikk fyri fyrireikingarnar – ikki bert fyri høga prísin, men eisini tí, at tað eru bara fólk í Estlandi, sum hava internetsamband og estiskt pass, sum sleppa at bjóða upp á atgongumerkini. Hetta gera, at hvørki tann stóri russiski minnilutin ella fastbúgvandi útlendingar sleppa við.

Fyri fyrstu ferð síðani 1979 er møguleiki hjá føroyingum at sleppa við til endaligu Grand Prix kappingina. Um tað eydnast Pæturi við Keldu at vinna kappingina í Danmark í februar, so skal hann umboða Danmark í Tallinn 25. mai.

Í 1979 vóru Annika Hoydal og Jógvan Telling við í donsku kappingini, tey gjørdust nummar 4…

Jólahugni í kirkjuni

JÓL
Ingrid Bjarnastein

Skúlabørnini skipa fyri guðstænastum fyri skúlabørn nú til jólar

Seinastu 20-30 árini hevur tað verið siður hjá skúlabørnum at fara í kirkju uppundir jól, sum ein liður í endanum av farna árinum. Hetta er ikki nøkur vanlig guðstænasta, skilt á tann hátt, at tað er ikki prestur og deknur, sum skipa fyri. Jólaguðstænastan hjá skúlunum er tann guðstænastan, har børnini sjálvi sleppa at skipa fyri.

Heri Joensen, prestur, hevur longu nú verið við til fleiri av jólaguðstænastunum hjá skúlunum. Í gjáramorgunin var hann til dømis í kirkjuni í Kirkjubø, har Velbastaðar skúli og barnagarður høvdu jólaguðstænastu.

– Hetta er ein hugnaløta fyri skúlabørnini, har skúlabørnini sleppa at vera ein liður í sjálvari guðstænastuni, sigur Heri Joensen, prestur.

Skúlabørnini skipa fyri guðstænastuni. Tað vil siga, at ein skúlanæmingur lesur inngangsbøn, ein annar útgangsbøn, næmingar spæla pre-og postludium á klarinett, blokkfloytu ella okkurt líknandi. Onkur næmingurin lesur síðani jólaevangeliið. Men hvør er so leikuluturin hjá prestinum í eini slíkari guðstænastu?

– Presturin skal halda eina stutta prædiku, greiðir Heri Joensen víðari frá.

– Eg royni at gera tað soleiðis, at tað verður ein prædika, sum ikki er ov tung og torskild, men er løtt hjá børnunum at skilja og hevur teirra áhuga. Onkuntíð plagi eg at brúka tað, at eg fortelji eina jólasøgu við kristnum innihaldi, sum eisini er upplýsandi.

Heri Joensen sigur, at hann plagar eisini at royna at fáa børnini við í prædikuna við at seta teimum ymsar spurningar og harvið gera prædikuna til eitt slag av dialogi. Hann sigur, at børnini eru ógvuliga áhugaði í hesum, kanska serliga tey lítlu.

Sambært Hera Joensen er tað ikki bara týdningarmikið, at tað er ein guðstænasta. Tað, sum er meira týdningarmikið er, at tað eru børnini sum skipa fyri henni.

Uppmøtingin er góð til guðstænasturnar. Kirkjurnar eru allar fullsettar og er hetta ein góður endi av tí farna árinum.